# Ein herskin biti av svølgja

**Tað er ein beiskur biti hjá javnaðarmonnum, at teir nú mugu leggja seg út í eitt stríð við fakfeløgini um verkfals- og samráðingarrættin. Kristian Magnussen, formaður í tingbólki Javnaðarfloksins, sigur, at hetta er eitt neyðugt stig at taka í núverandi støðu**

Sáttmálatræta
*Stefan í Skorini*

- Eg eri ikki glaður fyri, at vit nú noyðast at avmarka rættindini hjá einum fakfelag at gera sáttmálar, men hetta er eitt neyðugt stig at taka. Um øll framleiðsla á landi steðgar upp, skramblar alt saman, sigur Kristian Magnussen, nú samgongan hevur tikið stig til at steðga verkfallinum við lóg.

- Útflutningsvinnan hevur ikki gott orð á sær orsakað av verkføllum, og hetta ger støðuna frægari, sigur hann.

Formaður Starvsmannafelagsins, Gunnleivur Dalsgaard, er í øðini um støðuna, og hann hóttir við tiltøkum frá sínum limum.

### Neyðugt stig

Hóast Kristian Magnussen ikki er fegin um gongdina í málinum, heldur hann, at hetta er eitt neyðugt stig at taka - bæði at vraka sáttmálan millum SEV og Maskinmeistarafelagið og at tvinga maskinmeistararnar aftur til arbeiðis við eini løgtingslóg.

- Hevði Bárður Nielsen góðkent sáttmálan, hevði hann óbeinleiðis lagt støðið fyri komandi samráðingar á almenna arbeiðsmarknaðinum í heyst, og landskassin hevur heilt einfalt ikki ráð til slíkar lønarhækkingar, heldur Kristian Magnusen.

- Um vit geva eftir fyri lønarhækkingum nú, fer tað at hava avleiðingar fyri aðrar vælferðartænastur í Føroyum, sigur Kristian Magnussen, og so er spurningurin, um fólk yvirhøvur tíma at búgva her á landi.

### Løgin støða

Viðvíkjandi samráðingunum millum SEV og Maskinmeistarafelagið sigur Kristian Magnussen, at hetta er ein løgin støða við tað at landsstýrið er eftirlitsmyndugleiki, men ikki tekur lut í samráðingunum.

- Landsstýrið skuldi møguliga verið við í samráðingunum, men spurningurin er, hvønn leiklut tað skuldi havt. Vit skulu møguliga umhugsa, um landsstýrið yvirhøvur skal vera eftirlitsmyndugleiki og hava rættin at vraka slíkar sáttmálar, sigur Kristian Magnusen.



*Tað er vent í holuni í sambandinum millum nøkur av fakfeløgunum og Javnaðarflokkin, sum søguliga hevur roynt at hjúkla um samráðingar- og verkfalsrættin. Sum javnaðarmaður er Kristian Magnussen ikki fegin um, at samgongan nú fer at lóggeva maskinmeistararnar aftur til arbeiðis*
*Savnsmynd*

## Vox-pop um verkfallið hjá Maskinmeistarafelagnum



**Janus B. Kamban, snikkaralærlingur:**
Eg taki í prinsippinum ikki undir við, at tingið leggur seg úti hasa trætuna, tí at tingið skal halda seg uttanfyri slík mál. Tað er møguliga øðrvísi, tá landið liggur lamið og tey gomlu ikki fáa hjálp.

Eg haldi tó, at inflatión komið í hugtakið verkfall. Vit fara í verkfall fyri eitt gott orð ístaðinfyri at bíða til støðan veruliga er álvarsom.



**Árni Gærdbo, skræddari:**
Sjálvandi skal tingið leggja uppí hesa trætuna. Hetta líkist svartasta ongum. Vit sita trý fólk fyri einki ta løtuna, tá streymurin er farin, og tað ber ikki til. Bárður kann hinvegin ikki vænta at fáa alt fyri einki undir komandi samráðingum.



**Kirstin Olsen, arbeiðskvinna:**
Ja eg haldi, at tingið skal leggja uppí. Vit sleppa ikki til arbeiðis á fiskavirkinum, har eg arbeiði í løtuni.



**Kári Magnussen, snikkari:**
Tingið eigur ikki at leggja uppí undir vanligum umstøðum, men tað er kanska best í hesum føri. Streymur er heilt einfalt ov týdningarmikið fyri landið. Vit fáa ikki arbeitt, og tí skal tingið leggja uppí



**Johan Fjallsá, maskinmeistari:**
Nei eg haldi ikki, at tingið skal leggja uppí hetta málið. Fyri mítt viðkomandi kann eg gott liva uttan streym í nakrar tímar hvønn dag, men eg skilji væl, at tað er sera óheppið fyri útflutningsvinnuna. Eg haldi, at SEV má fáa baklandið í ordan, tí vit kenna støðuna frá seinastu samráðingum. Teir hava ikki lært nógv.

*Myndir: Bárður Lydersen*

Andstøðan finst at landsstýrinum:

# Eingin kunning um málið

Sáttmálatræta
*Stefan í Skorini*

Tá vit tosaðu við umboð fyri andstøðuna mikumorgunin, vildi eingin boða frá síni støðu til uppskotið, sum samgongan legði fyri tingið kl. 16. Orsøkin var, at landsstýrið ikki hevði kunnað andstøðuna um uppskotið fyri tingfundin.

- Tað er undir allan kritik, at samgongan ikki kunnar andstøðuna um innihaldið í uppskotinum, áðrenn fundin. Vit hava ikki havt grundarlag fyri at taka støðu fyri ella ímóti, tá vit ikki hava tilfarið, sigur Páll á Reynatúgvu, framsøgumaður hjá Tjóðveldisflokkinum.

Kári P. Højgaard hevur somu grundgeving fyri, hví hann ikki vil geva sína støðu til kennar.

- Eingin kunning hevur verið frá landsstýrinum, og tí skyldar Bjarni Djurholm okkum eina djúptøkna frágreiðing um málið, sigur Kári P. Højgaard, tinglimur fyri Sjálvstýrisflokkin.

- Mær dámar ómetaliga illa at leggja meg út í eina sáttmálatrætu, men vit mugu bíða og síggja, hvussu leikur ferst, sigur Kári P. Højgaard.

# Neyvan nøkur semja fyri tingfundin

**Fyri tveimum árum síðani skrivaði Maskinmeistarafelagið undir nýggjan sáttmála hálvan tíma undan fráboðaða tingfundinum, men vit kunnu ikki vænta tað sama hesuferð.**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Stefan í Skorini*

Báðir partar váttaðu mikumorgunin, at samband var millum partarnar, men søgdu samstundis, at einki ítøkiligt var á borðinum.

- Tað er lítið sannlíkt, at vit gera ein nýggjan sáttmála fyri tingfundin eins og seinast, segði Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

- Vit eru ikki bangnir fyri, at tingið samtykkir okkara sáttmála við lóg, men fara aftur til arbeiðis við uppreistari pannu, leggur hann afturat.

### Bíða til í heyst

Klæmint Weihe, stjóri á SEV, væntar ikki, at partarnir fara at møtast fyrr enn í heyst, um løgtingið nú samtykkir at leingja sáttmálan við lóg.

- Vit fara helst at bíða til eftir 1. oktober, tá samráðingarnar millum Starvsmannafelagið og landsstýrið eru lidnar, sigur Klæmint Weihe.

Hann vísir á, at SEV eins og Maskinmeistarafelagið vildi hava Fíggjarmálaráðið við í samráðingarnar, men hesum ynski vildi Fíggjármálaráðið ikki ganga á møti.

- Teir boðaðu frá, at teir vildu hava eina null-loysn, men vit vistu ikki nágreiniliga, hvat tað merkti, sigur Klæmint Weihe.

Um tingið samtykkir uppskotið frá samgonguni, gongur ikki long tíð, áðrenn streymveitingin er normaliserað.

- Tá vit fáa Sundsverkið í gongd, kunnu vit aftur veita streym sum vant, sigur stjórin í SEV.